


# Borgarstjórar ósamdir um Stórjutjørn

**ÓSEMJA Borgarstjórin og varaborgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen og Bogi Andreasen er ósamdir um byggisamtyktina fyri Stórutjørn. Heðin Mortensen vil halda fast um gomlu miðdepilsætlanina, meðan varaborgarstjórin ikki sær orsøk til at leggja økið lamið longur**

Barbara Holm

Heðin Mortensen og Bogi Andreassen eru ikki á einum máli um, hvat nógv umrødda Stóratjørnøkið í Hoyvík skal nýtast til.

Leingi hevur verið tosað um Stórutjørn verkætlanina, men fíggjarkreppan og aðrir faktorar gera, at ætlanin ikki longur tykist serstakliga veruleikakend – í øllum førum ikki við upprunaligu byggiharrunum.

Men borgarstjórin er ikki til reiðar at lata ætlanina fara fyri skeyti, meðan varaborgarstjórin vil gagnnýta stóra økið til eitt nú kirkjugarð og frískúla.

Málið endaði á býráðsfundi hjá Tórshavnar býráð í farnu viku, eftir at ein samd byggi og býarskipanarnevnd legði uppskotið fyri býráðið at samtykkja. Men soleiðis skuldi ikki verða – Heðin Mortensen tók málið av skránni, tí hann vildi hava meira kunning í málinum.

– Hetta málið er ikki ókent fyri Heðin Mortensen ella aðrar býráðslimir, so eg skilji rætt og slætt ikki, hvat Heðin Mortensen meinar við, tá hann sigur, at meira kunning má fáast um málið, sigur Bogi Andreassen.

Men Heðin Mortensen heldur, at býráðslimir eiga at fáa kunning, um teimum tørvar tí.

– Áheitanir komu frá býráðslimum, um at meira kunning mátti fáast á málinum, áðrenn kirkjugarðurin endaliga kundi leggjast har, og tað eiga vit eisini at fáa, sigur Heðin Mortensen.

Heðin Mortensen vísir á, at íbúgvar í økinum skulu hoyrast, áðrenn býráðið kann taka eina slíka avgerð.

### Stóratjørn kann broyta skap

Tað tykist hóast alt verða semja um, at Stóratjørn verkætlanin, sum vit kenna hana, ikki kann gerast veruleiki við verandi byggiharrum. Spurningurin tykist verða, hvørt Stóratjørn er mest egnaða staðið at leggja ein kirkjugarð og frískúla.


*Heðin Mortensen og Bogi Andreasen*

– Umsitingin hjá býráðnum hevur nýtt nógva orku og pening upp á júst hetta málið, staðfestir Bogi Andreassen, sum heldur hetta málið verða drigið ov langt út.

Heðin Mortensen hevur eisini víst á, at hann framvegis hevur álit á, at Stóratjørn verkætlanin verður til veruleika – helst við øðrum byggiharrum – men hesum er varaborgarstjórin ikki samdur í.

– Eg eri samdur í, at ein stórur miðdepil skal verða í Hoyvík, men Stórutjørnverkætlanina trúgvi eg ikki uppá, sigur Bogi Andreassen, sum ikki skilir hugsanina hjá borgarstjóranum á økinum.

Málið skal nú aftur í umsitingina hjá býráðnum og í byggi- og býarskipanarnevndina, og enn er ikki greitt nær málið verður lagt fyri býráðnum.

*barbara@sosialurin.fo*